UTTAN ÚR HEIMI

## So er tað álvarssamt

– Var tað veruliga al-Qada, sum legði bumburnar í Madrid, er tilburðurin uppaftur meiri álvarssamur, enn um tað var ETA, tíí so hevur al-Qaeda megnað at byrja eitt hermót í Evropa. Annars hevur felagsskapurin hildið seg til tann muslimska heimin síðani atsóknirnar at USA.

Tað sigur Barth Eide, sum er granskari á uttanríkispolitiska stovninum í Oslo. Hann heldur kortini, at tað er ov tíðliga at sleppa illgrunanum til baskiska tann felagsskapin.

– At onkur vil vera við, at tað var al-Qaeda, er ikki nakað endaligt prógv, men fáa teir sponsku myndugleikarnir prógv fyri, at tað var ikki ETA, so er støðan álvarssom, sigur Barth Eide við NTB.

Og hann heldur ikki, at tankin um al-Qaeda er so fjarur. Í hesum sambandi vísir hann á brævið frá Abu Hafs al-Maari-brigadunum, ljóðbond, sum eru funnin aftan á atsóknina hósmorgunin og sjálva atsóknina. Eisini vísir hann á, at al-Qaeda hevur fyrr roynt at fáa fótin fastan í Evropa, og at fleiri yvirgangsætlanir hjá felagsskapinum eru avdúkaðar og tí vorðnar av ongum. At Spania møguliga gjørdist tað fyrsta málið hevur uttan iva samband við spanska stuðulin til USA í krígnum við Irak, sigur norski granskarin.

– Bæði ETA og al-Qaeda kunnu hava hugsað sum so, at tað var rætt at skipa fyri einari atsókn beint upp undir spanska valið sunudagin, sigur Barth Eide.

## Danska tilbúgvingin óbroytt

Eins og Spania stuðlaði Danmark USA í krígnum við Irak, men fregnartænastan hjá donsku løgregluni, PET, heldur ikki bumbuatsóknina í Madrid vera orsøk til at herða tilbúgvingina í Danmark.

Leiðarin í PET, Lars Findsen, segði fyrrakvøldið, at donsku myndugleikarnir eru á varðhaldi, og at teir hava samband við myndugleikarnar í øðrum londum um støðuna. Men sum er er einki, sum gevur orsøk til at herða tilbúgvingina, segði Lars Findsen.

# USA er næsta málið

**– Vit eru lidnir við 90 prosent av fyrireikingunum til næsta álopið, sum verður á USA, sigur felagsskapurin Abu Hafs al-Maari, sum hevur tætt tilknýti til al-Qaeda, og sum hevur átikið sær ábyrgdina av bumbunum í Madrid**

YVIRGANGUR
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*



*Hóttanarbrævið frá Abu Hafs al-Maari*

Kanningarnar hjá sponsku myndugleikunum aftan á ta blóðugu bumbuatsóknina í Madrid hósmorgunin eru nú í tveimum. Myndugleikarnir hella framvegis til, at tað var baskiski yvirgangsfelagsskapurin ETA, sum legði bumburnar, men hinvegin kunnu teir ikki avvísa, at tað kanska var tann víðgongdi muslimski felagsskapurin Abu Hafs al-Maari.

Hesin felagsskapurin hevur í einum brævi til eitt arabiskt blað í London kunngjørt, at tað var hann, sum legði bumburnar í Madrid. Málið var eisini týðiligt:

– Hvar er Amerika nú, Aznar?" stóð í kunngerðini, og spurningurin sipar til, at Spania stuðlaði USA í krígnum í Irak. Felagsskapurin hóttir samstundis onnur lond.

– Hvør skal nú verja Spania, Bretland, Japan, Italia og hinar svíkjararnar ímóti okkum? Tað hevur eydnast okkum at raka hjartað á teimum evropeisku krossfararunum og at søkja at einum av luttakarunum í krossfararasamgonguni, stóð í kunngerðini.

### USA næstu ferð

Í kunngerðini ávarar Abu Hafs al-Maari um, at felagsskapurin er í ferð við at fyrireika eitt álop á USA.

– Vit hava góð tíðindi til muslimar um allan heimin. Fyrireikingarnar til álopið "Vindar við svørtum deyða" ímóti Amerika eru næstan lidnar. Vit hava fingið 90 prosent av fyrireikingunum frá hondini. Um Guð vil, verður álopið sett í verk í næstum, stendur í kunngerðini, sum felagsskapurin sendi arabiska blaðnum Al-Quds al-Arabi, sum hevur høvuðsskrivstovu í London.

Amerikanski innanríkisráðharrin, Tom Ridge, sum er staddur í Teilandi, segði í gjár, at USA tekur ávaringina í størsta álvara.

– Júst nú vita vit bert, at vit eru høvuðsmálið, men tað er í sjálvum sær ikki nakað nýtt, segði Tom Ridge

### Vinmaður bin Laden

Felagsskapurin Abu Hafs al-Maari verður hildin at hava tætt tilknýti til al-Qaeda hjá Osama bin Laden. Felagsskapurin er uppkallaður eftir einum fyrrverandi egyptriskum løgreglumanni, sum var vinmaður bin Ladens, og sum doyði í einum amerikonskum rakettálopi sunnan fyri Kabul í Afghanistan í november í 2001.

Fregnartænastur vilja vera við, at ein dóttur Abu Hafs giftist einum soni Osama bin Laden í januar í 2001.

Amerikanska fregnartænastan hevur fyrr sagt, at Abu Hafs hevði havt samband við fleiri av teimum, sum rændu flogførini í USA tann 11. september í 2001. Felagsskapurin hevur fyrr átikið sær ábyrgdina av bumbuspreingingum í Turkalandi og Irak.

# Hungur, morð og neyðtøkur eru gerandiskostur

**Støðan í sudanska landspartinum Darfur er í ferð við at gerast ein sonn menniskjalig vanlukka. siga amerikanskir neyðhjálparmenn**

VANLUKKA
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

– Hetta er uttan iva tann ringasta menniskjaliga vanlukkan í Afrika og kanska í øllum heiminum, segði leiðarin í amerikanska hjálparfelagsskapinum USAID, Roger Winther, í einari hoyring í Kongressini í Washington fyrradagin.

Hann greiddi frá, at vápnaðir bólkar gera seg inn á fólkið í landspartinum Darfur. Talan er um etniska útreinsan, og kvinnur í hópatali verða neyðtiknar, segði Roger Winter, sum samstundis minti umheimin á, at í hesum sama landspartinum líða meiri enn ein millión fólk hungur.

– Støðan er so spent, at vit nærkast einum hópmorði, segði leiðarin í USAID.

Amerikanski varauttanríkisráðharrin Charles Snyter gevur sudansku stjórnini skyldina av gongdini. Hann sigur, at stjórnin hjálpir teimum vápnaðu bólkunum, og tí hevur hon ábyrgdina av tí, sum teir gera, sigur Snyter.

P/F ALMA
Maskinverkstaður & Smiðja
Munters
The Humidity Expert
Munters produktini avfukta kølirúm, frystirúm og aðrar goymslur, produktiónshølir, teknikkrúm, turkirúm, garagur, loftsrúm og kjallarar við kondenstrupulleikum, eins og onnur hølir har fukt ella kondens kann gera skaða, ella um eitt turrari umhvørvi er eitt ynski ella krav.

Á hjalla 15 · Boks 1338 · 110 Tórshavn · tel 31 58 90 · fax 31 04 68 · henrik@alma.fo

Vikuskifti
Nr. 51 • leygardagur • 13. mars 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo

Apartheid spøkir enn

Lesið ferðafrásøgn úr Cape Town



Lesið síðu 4–5



*Eitt barnakór við 300 luttakarum fløvaði hjartastreingirnar á teimum mongu áhoyrarunum í leguhúsinum í Nesvík seinasta leygardag*

*Mynd: Jon Hestoy*

# Sangdagur barnanna

Á sangløtu í leguhúsinum í Nesvík seinasta leygardag, framførdu ikki færri enn 300 børn í einum felagskóri fyri yvir 300 áhoyrarum. Fýra sangir framførdu tey, harav tríggir vórðu gjørdir til dagin

SANGLØTA
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

Flest øll fólk munnu dáma væl tónleik og sang. Tað er sjálvandi ymiskt, hvat fyri slag av tónleiki, hvør einstakur dámar. Men øll munnu vit dáma okkurt. Og lítið man vera at ivast í, at tað er sera fløvandi at hoyra barnarøddir syngja. Og tað gjørdu 300 barnarøddir í Nesvík seinasta leygardag, har Heimamissiónin skipaði fyri Sangdegi barnanna.

300 spent børn sluppu at framføra fýra sangir, sum tey høvdu lært eftir lítlari løtu á tiltaki í Nesvík framman fyri einum stórum áhoyraraskara.

Sangdagur barnanna er eitt árligt afturvendandi tiltak, sum Heimamissiónin skipar fyri. Ein av fyrireikarunum Jóna Thomsen sigur, at tiltakið var væleydnað.

Vanliga hevur tiltakið einans verið fyri barnakórum, men í fjør byrjaðu tey at bjóða sunnudagsskúlabørnum við eisini.

Hetta varð gjørt fyri at fáa enn fleiri børn við, og eydnaðist tað til fulnar.

Við teimum mongu barnakórunum og sunnudagsskúlabørnunum eisini, taldi felagskórið, sum framførdi, tilsamans 300 børn.

### Sangir til tiltakið

Dagurin byrjaði klokkan tíggju fyrrapartin við felagssangi og andakt. Síðani varð farið undir at venja teir fýra sangirnar, sum kórið skuldi syngja. Børnini vandu fyrst í ein tíma, síðani var ein støðgur, har tey ótu matpakka og fingu høvi at hugna sær og taka sær av løttum eina løtu, áðrenn tey hildu fram við venjingunum.

Tey vandu sum sagt fýra sangir, sum tey ikki høvdu sæð áður. Tað er Eyðbjørn Jacobsen úr Klaksvík, sum hevur gjørt sangirnar. Ella rættari tríggjar av teimum. Tann fjórða hevur hann umsett úr norskum. Tveir av sangunum vórðu gjørdir júst til sangdagin, og tað lá væl fyri hjá børnunum at syngja teir. Hóast tey einans høvdu nýtt hálvan triðja tíma til at læra teir.

Tað vóru Tummas Pauli Mýru og Hans Michael Mittúni, sum løgdu børnunum lag á. Og teir høvdu valt at lata onkur av børnunum syngja einsamøll, meðan kórið so bert tók undir í niðurlagnum. Hetta eydnaðist sera væl.

Jóna Thomsen heldur, at børnunum dámar væl at koma til hendan sangdagin í Nesvík. Talið á luttakarum er vaksandi – serliga síðani sunnudagsskúlabørnini eru komin við eisini.

– Í fjør og í ár hava tað verið 300 børn, og er tað sjálvandi væl meiri enn, áðrenn sunnudagsskúlabørnini komu við. Men talið øktist eisini frammanundan, sigur Jóna Thomsen, sum er sunnudagsskúlaráðgevi hjá Heimamissiónini.